## Claus Bech leitar framvegis

Claus Bech Jørgensen hevur framvegis ikki funnið sær nýggjan arbeiðsgevara, síðan hann og Blackpool samdust um ikki at leingja samstarvið fyri tveimum mánaðum síðan. Fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin ætlaði sær til Danmarkar at spæla fótbólt, men tað eydnaðist honum ikki at finna sær felag í SAS-liguni. 33 ára gamli miðvallarin hevur nú slept teimum ætlanunum og er farin aftur til Onglands at leita.



## FCK ávegis í bólkaspæli

FC Keypmannahavn er ávegis í bólkaspælið í Champions League. Í gjár vunnu verandi donsku meistararnir við 3-1 á heimavølli móti norska Stabæk. Og tað er ikki nógv sum bendir á, at norðmenninir fara at gera eina vørr í seinna dystinum um eina viku. Cesar Santin stóð fyri tveimum av málunum, og Jesper Grønkjær skoraði eitt. Daniel Nannskog skeyt málið hjá Stabæk.

# menn í Víkingum



Víkingur var vaks frá byrjan og tað gav bonus í síðsta enda. Sigurin merkir eisini, at tað ikki eydnaðist EB/Streymi at vinna steypafinaluna triðja árið á rað
Mynd: Álvur Haraldsen

## Finalan um kappingina um Løgmanssteypið 2009

**EB/Streymur - Víkingur 2-3 (1-1):**
**0-1:** Hans Jørgen Djurhuus, 7.
**1-1:** Pauli G. Hansen, 16.
**1-2:** Andreas Lava Olsen, 48.
**1-3:** Finnur Justinussen, 88.
**2-3:** Arnbjørn Hansen, 89.
**Dómari:** Páll Augustinussen.
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Bárður Olsen, Dánjal Davidsen, Sorin Anghel, Leif Niclasen – Pauli G. Hansen (Brian Olsen, 71.), Levi Hanssen (Pætur Dam Jacobsen, 84.), Marni Djurhuus – Hans Pauli Samuelsen, Arnbjørn Hansen, Gudmund Nielsen (Alex Santos, 52.).
Gul kort: Dánjal Davidsen.
Víkingur: Geza Turi – Sverri Jaobsen, Niclas Niclasen, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Hans Jørgen Djurhuus (Erling Jacobsen, 71.) Zoltan Bukszegi, Súni Olsen, Sølvi Vatnhamar (Símun Louis Jacobsen, 85.), Andreas Lava Olsen (Áslakkur Petersen, 80.) – Finnur Justinussen.

minuttir gamal, tá Andreas Lava Olsen skoraði fyri Víking.

Undan hesum máli hevði Pauli G. Hansen minkað um munin, men Finnur Justinussen økti um leiðsluna, tá tað bara restaðu tveir minuttir av dystinum og tá gjørdist sigurin veruleiki. Arnbjørn Hansen, ið annars hevði víst millum lítið og einki allan dystin, skapti spenning í dystin aftur, tá hann minkaði um munin beint eftir triðja málið hjá Víkingi, og tá vaknaði EB/Streymur eina løtu.

Hans Pauli Samuelsen brendi eitt skot á stongina, og Dánjal Davidsen stútaði bóltin sentimetrar framvið málinum. Líka við og næstan, men á ongan hátt nóg gott.

### Sjey gul kort

Gott er tað hinvegin hjá Víkingi. Liðið hevur onkuntíð spælt betri fótbólt, enn teir gjørdu í steypafinaluni, men í gjár spældu teir síni kort rætt. Kort fekk Víkingur eisini heili seks av, men so leingi, at sami maður ikki fær fleiri enn eitt, er liðið fullmannað og tað var Víkingur allan dystin. Hetta hóast, at sundalagsfólk helst vilja vera við, Súni Olsen átti at fingið sítt seinna gula kort, tá hann á miðjum velli háláði Arnbjørn Hansen niður, og at Atli Gregersen átti at verði vístur av vøllinum, tá hann sparkaði út eftir Leif Niclasen, ið royndi at vinna liði sínum nøkur dýrabær sekund og fáa bóltin niðan á miðvøllin beinanvegin eftir, at EB/Streymur hevði minkað um munin ein minutt fyri leiklok.

Einasti maðurin hjá EB/Streymi, sum fekk kort, var Dánjal Davidsen. Hetta var gult, men sami maður var heppin ikki at fáa eitt av sama slag aftrat, tá hann hekk í Andreas Lava Olsen, meðan hesin hevði beina kós móti málinum.

### Santos á beinkinum

Alex Santos syrgdi fyri, tá han kom á vøllin, at EB/Streymur fekk betri kós móti málinum hjá Víkingi. Saman við Hans Paula Samuelsen kom hann væl upp við fleiri ferðir. Hann tók yvir á vinstra bakki, tá Leif Niclasen varð fluttur upp í álopið, men hví brasiliumaðurin ikki byrjaði inni, er undrunarvert.

Hann og Hans Pauli Samuelsen hava fleiri ferðir víst, tá teir hava verið á vøllinum saman, at teir eru eitt ógvuliga sterkt par á síðuni, og tað vístu teir enn einaferð í gjár.

Liðið hjá Víkingi gav seg hinvegin sjálvt, í rættiliga stóran mun.

### Sigrar eru krav

Eitt annað, sum eisini gevur seg sjálvt nú, er at EB/Streymur einki hevur eftir at tapa. Landskappingin byrjar sunnudagin og ein sigur á KÍ er eitt ófrávíkiligt krav. Sama má sigast um dystin hjá Víkingi, sum skal vinna á AB fyri at halda tørn millum fremstu liðini.